




Eitt fyribilsstarv sum málsviðgeri í hálva tíð er leyst at søkja á økisdeildini í Suðuroy.

## Almannastovan í Suðuroy søkir málsviðgera

Hevur tú hug at royna teg í fjølbroyttum, avbjóðandi starvi?

So er hetta nakað fyri teg. Eitt fyribilsstarv sum málsviðgeri í hálva tíð er leyst at søkja á økisdeildini í Suðuroy.

Nærri fæst at vita við at venda sær til John Mortensen, deildarleiðara á tlf. 353560, ella við at fara á heimasíðu okkara www.almannastovan.fo ella www.portal.fo.

Umsóknarfreistin er 15. juli 2006

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 4780 80

## ÚTFERÐ Í STAKKIN



Um viðrar, verður skipað fyri útferð tann 9. og 23. juli kl. 14.00

Kostnaður: Vaksin 300 kr
Børn 150 kr

Tilmelding á telefon
22 18 73 - 42 34 01 - 42 33 57

Stakksnevndin í Tjørnuvík

W W W . S O S I A L U R I N . F O






Tænastan á Smyrli skal hækkast munandi, og á øllum økjum skal tann ferðandi setast í miðdepilin. Ein grundleggjandi hugburðarbroyting skal gjøgnumførast á okkara stásiliga flaggskipi, og tí verður søkt eftir tveimum tænastuleiðarum, ið hava evnini og viljan at fremja broytingarnar.

**Starvið**
Tænastuleiðararnir umborð á Smyrli skulu tryggja eina professionella kundatænastu á høgum stigi umborð. Tað skal sigla tað verða ein uppliving í sær sjálvum, og myndaliga talað skal tað kennast sum at koma á hotell, har hugsað er um øll – børn, vaksin og gomul.

Starvsfólkini í vistaveitingini hoyra undir tænastuleiðaran. Tænastuleiðarin hevur ábyrgdina av rakstrinum av kafeteriu, kiosk, reingerð, fundarhølum og størri tiltøkum, og saman við fyrstakokki hevur tænastuleiðarin vøruinnkeyp og vørugoymslu um hendi.

**Umsøkjarin**
Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir innan tænastuvinnuna. Hevur tú arbeitt sum hovmeistari, yvirtænari ella leiðari á hotelli, eru vit sera áhugað.

Vit leggja stóran dent á leiðsluroyndir og viljan og evnini til at royna nýggjar leiðir. Ein umráðandi eginleiki er ein professionellur hugburður, har dentur verður lagdur á trivnaðin hjá tí einstaka ferðafólkinum. Tænastuleiðarin má verða dugnaligur at skapa nýggjar inntøkur og effektivan rakstur.

Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til mat, mugu vera vanir at brúka teldu og vera málsliga væl fyri. Góð samstarvsevni og evnini at kveikja sínar starvsfelagar eru ein fortreyt, skulu úrslit røkkast. Neyðugt er at hava heilsuprógv og trygdarskeið.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt sjálvstøðugt starv við spennandi fakligum avbjóðingum. Starvið sum tænastuleiðari er nýtt, og tí sleppur tú sjálv/ur at skipa og menna innihaldið í starvinum.

Smyril er nýggjasta skipið í flotanum. Hann hevur fingið viðurkenning fyri sítt snið, og arbeiðsumstøðurnar umborð eru frálíkar.

Arbeitt verður í skiftum, og tú kemur at arbeiða aðru hvørja viku og hava frí aðru hvørja viku. Setanartreytirnar verða annars skipaðar sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn og freist**
Vilt tú hava meira at vita um størvini, kanst tú venda tær til Heina á Borg, deildarleiðara, telefon 54 30 61 ella e-post: hab@ssl.fo.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. juli. Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

Strandfaraskip Landsins
Starvsfólkadeildin
Boks 88
110 Tórshavn

sansir.fo

Strandfaraskip Landsins fevna um Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir, sum skulu lúka landsins tørv á fólkaflutningi. Fyritøkan skal mest gjørligt rekast á handilsligum grundarlagi. Stórar broytingar eru hendar á Strandfaraskipum Landsins seinnu árini, og víðfevndar menningarætlanir liggja fyri stavn. Millum hesar kann nevnast ein framhaldandi uppstiging og endurnýgging av tænastukervinum á sjógvi og landi.

STRANDFARASKIP LANDSINS